# TILTØK

**Gudstænastur**
Søldarfjørður: Meinhard Bjartalíð kl. 11, altargongd
Funningur: Emil Olsen kl. 12, messa
Eiði: Martin R. Jacobsen og Emil Olsen kl. 17, messa
Fríðrikskirkjan: Martin R. Jacobsen kl. 11
Hósvík: Marjun Bæk kl. 12
Haldórsvík: Inga Poulsen Dam kl. 12, altargongd
Hvalvík: Povl Bendix Knudsen kl. 12
Vesturkirkjan: Bergur D. Joensen kl. 11, altargongd
Sandavágur: David Johannesen kl. 12
Christianskirkjan: Christian Haahr Andersen kl. 11
Húsar: Niels Pauli Danielsen kl. 12, altargongd
Kunoy: Hans Eiler Hammer kl. 12, altargongd
Havnar kirkja: Bjarni Bæk kl. 11, altargongd, skriftamál kl. 10.40
Argir: Heri Joensen kl. 11, altargongd
Nólsoy: Sonja Klein kl. 12
Fámjin: Jónsvein Bech kl. 12
Selatrað: John S. Myllhamar kl. 12
Hvannasund: Elsa Funding kl. 12, altargongd
Vágur: Marianne Telling kl. 11, útvarpsgudstænasta við Ljómi
Sumba: Ólavur Rasmussen kl. 12.00
Skopun: Jákup R. Hansen kl. 12
Sjóvar kirkja: Undir gudstænastuni sunnudagin kl. 12 syngja Símun Rasmussen av Strondum og tríggir kingomenn úr Fuglafirði sálmar, so sum teir eru sungnir í Sjóvar sókn

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30: Morgunmøti. Ímeðan er skipað barnaansing. Kl. 12.00: Sunnudagsskúli og samstundis kl. 12 møti. Jens Vang talar.
Heimasíða www.hebron.fo

## GULLBRÚDLEYP

Týsdagin 26. november hava Elin og Hans Petur Brekkstein, Velbastað, verið gift í 50 ár. Leygardagin 30. november kl. 11.00–17.00 eru øll vælkomin í Pálsstovu, Mykinesgøta 7, Tórshavn.

Leygardagin 30. november hava Sanna og Henning Mortensen, Argjavegur 40 á Argjum, verið gift í 50 ár. Opið hús verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

## SILVURBRÚDLEYP

3. desember kunnu hjúnini Ásbjørg og Heini Reinert, Leirvík, halda silvurbrúdleyp. Vælkomst verður heima 30. november frá kl. 19.00.

## BRÚDLEYP

14. desember kl. 16.00 giftast í Gøtu kirkju Noomi Sigurðsdóttir Sørensen, Norðragøta, og Petur Reinert, Leirvík. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið, kunnu tekna seg á tlf. 441363 ella 443215 í seinasta lagi 8. desember.

Leygardagin 4. januar kl. 17.00 giftast í Vesturkirkjuni Margreta Dam, Argir, og Brynjer Gregoriussen, Tórshavn. Veitsla verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at ringja á tlf. 213065 ella 313054 innan 20. desember.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 23. nov.: Gøta, tlf. 441086
Sunnudagin 24. nov.: Runavík, tlf. 447010

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Ein livandi vón. Kl. 11.00 Talar Børge Schantz um evnið: Tríggir lærdómar í trúboðanartænastu frá eini falnari kvinnu.

**Lívdin**
Samkoman Lívdin hevur familjumøti kl. 10.30 og tilbiðjanarmøti, kl. 12.00 hvønn sunnudag í Hoyvíkar skúla. Barnaansing er undir báðum møtunum og sunnudagsskúli er kl. 12. Millum møtini er drekkamunnur.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin sunnudagsskúli kl. 14.00, møti kl.18.00 v/ Andreas Frantzen. Mánadagin bønarmøti kl. 20.30.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Vikuskiftismøtir fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20.00. Sunnudagin kl. 11.00 og 18.00. Suðuroyingar vitja við sangi og talu. Øll eru vælkomin.
Sunnudagsskúli kl. 14.00.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10.00: Morgunmøti. Sunnudagsskúli kl. 12.00. Evangelisktmøti kl. 18.00.
Mikudagin kl. 20.00: Bønar og uppbyggingarmøti.
Øll eru vælkomin
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Rhema á Hálsi**
Sunnudagin kl. 17.00 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Konfirmatión av Mariu Magnussen verður sunnudagin kl. 11.00 v/ Biskop Czeslaw Kozon í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Kl. 14.00 Sunnudagsskúli.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin 25. nov. kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Anniku og Steingrím Niclasen.

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22.00 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri. Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, 18.00 Møti við Regin Olsen, Meinigheitskórið syngur. Mánakvøldið kl. 20.00: Kvinnumøti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17.00: Landsbøn.
Sunnudagin kl.11.00: Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30: Barnagudstænasta. Einki kvøldmøti vegna møti í Lærararskúlahøllini. Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13.00: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 17.00: Møti.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli og juniormøti.

**Tórshavnar Sjómansheim**
Evangeliskt møti verður týsdagin 26. nov. kl. 19.30 v/ Vibeke Schaffalitzky og Inger J. Hildershavn. Øll eru hjartaliga vælkomin. Tlf. 266057

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti við breyðbróting. Mánakvøldið kl. 20.00: Húsmøti hjá Fríðbjørn og Kristu. Telefonandaktin 424741.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30: Sunnudagsskúli, kl. 19.00: Møti við luttøku úr Leirvík. Mánadagin kl. 17.30: Barnaringurin, kl. 18.30 er hugnaløta við burturluting.

**Hvalvík**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið 28. nov. kl. 19.30. Tann árliga burturlutingin verður. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Zion, Kollafjørður**
Ungdómsmøti við Onnu Fuglø og David Rodda verður leygardagin 23.11. kl. 20.00. Hugnaløta við drekkamunni verður aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30 í Thabor og á Kambsdali. Møti er kl. 18.00 og ungdómsmøti kl. 21.00.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin verður morgunmøti við Dávid Bech kl. 10.30 (Breyðbróting) og evangeliskt møti kl. 17.00 við Hargar Hansen og Kára Jacobsen. Mánakvøldið kl. 20.00 ungdómsmøti.

**Keldan, Skálafirði**
Leygardagin kl. 17.30-19.30 juniorarbeiði fyri børn 3.-7. flokk.
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús, ung luttaka. Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Osbjørn Joensen, barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í Kelduna, www.keldan.fo

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20.00. Sylverius Jacobsen luttekur. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli og kl. 19.00 møti. Missiónsvikan byrjar týskvøldið 26. nov. kl. 20.00 við møti, har Niels J. Nielsen, trúb., talar. Ungdómskórið á Strondum syngur. Missiónsvikan heldur fram vikuna út.

**Haldórsvík**
Missiónsvikan heldur fram í Avhaldshúsinum í kvøld kl. 20.00. Klæmint Tausen talar, Glyvrakórið syngur. Innsavnan. Sunnudagin kl. 14.30: Familjumøti. Sunnukvøldið kl. 18.00 talar Regin Høgnesen, Jóhanna, Hallgerð og Marita syngja. Innsavnan. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Eldrafelagnum Nón Saltangará**
Vit koma saman í Hæddini týskvøldið 26. nov. kl. 19.30. Jógvan Ingvard Olsen verður við. Nýggir limir eru vælkomnir við.
*Eldarfelagið Nón*

**Kongshavnar Kvinnufelag**
Hevur jólahugna fyri limir við gesti í húsum felagsins mikukvøldið 4. des. kl. 19.00.

**Betania Skopun**
Leygardagin: kl. 11.00: Barnaarbeiði 3 til 6 ár. Kl.14.00: Barnaarbeiði 1. til 3.flokk. Kl. 17.00: Barnaarbeiði 4. til 6.flokk.
Sunnudagin: Kl.11.00: Morgunmøti, kl.18.00: Evangeliskt møti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli, kl. 17.30: Bøn & lovsangur, kl. 18.00: Møti. Týsdagin kl. 16.00 venjagentur frá 1. fl. og upp eftir Santa Lucia. Mikukvøldið kl. 20.00: Bíbliutími.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Kristian Martin Petersen. Sangur: Askham, kl. 21.00 Ungdómsmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti við bólkinum sum hevur verið í miðeystri. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Hjørdis og Dánial Petersen. Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.

**Frelsunarherurin, Vági**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Mánakvøldið kl. 20.00: Heimaforbundið.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00: Breyðbróting, kl. 13.30: Sunnudagsskúli, kl. 18.00: Evangeliskur fundur. Mánadagin kl. 20.00: Bønarfundur. Ónsdagin kl. 20.00: Uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.00. Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.00. Sunnukvøldið kl. 18.00 verður møti við Fríðgerð. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møtið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Sumba**
Útimøti verður sunnukvøldið kl. 20.00. Viðrar ikki, verður møtið inni. Øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Felagið Tórshavn GONGUTÚRUR**
Sunnudagin 24. nov. verður ein gongutúrur frá Argja hospitali til gamla hospitalið. Byrjað verður við Róðrarneystið á Argjum kl. 14.00. Bussleiðin, leið 3, fer úr Steinatúni kl. 13.50. Tilmelding.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

**Pensionistafelagið í Havn**
kemur saman hvørt mikukvøld í Losjuni, Tinghúsvegur 18, kl. 19.00, við ymiskum tiltøkum. Uml. eina ferð um mánaðin hava vit bingo, tá byrja vit kl. 18.00. Øll, sum eru 60 ár og eldri og búgva í Tórshavnar kommunu eru vælkomin at gerast limir. Tygum kunnu ringja til Gunleyg á tlf. 312864 ella Karin á tlf. 311247. Mikudagin 27. nov. hava vit jólasølu, tombola og kafé. 4. des. hava vit jólabingo. 11. des verður jólahugni og søla av lutaseðlum 18. des verður jólaveitsla á Hotel Hafnia.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Jólasøla verður alla vikuna frá kl. 14–17.00 í kjallaranum. Inngongd frá Grasagarði**
*Mánadagin 25. nov.:*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Ítriv vit hugsa um jólini
**kl. 14-17 Jólasøla í kjallaranum**
*Týsdagin 26. nov.:*
kl. 10-12 Vit baka til jóla
kl. 10-11.30 Vit syngja, Benny og Flemming Samuelsen
Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 **Sára Malena í Skúgvi (1832-1903)** Ólavur Clementsen
*Mikudagin 27. nov.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði.
kl. 15 Túrur. Sjá skránna í bløðunum
kl. 14-17 Jólasøla í kjallaranum
*Hósdagin 28. nov.:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-12 Virka til jóla
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Jólasøla í kjallaranum
*Fríggjadagin 29. nov.:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 14-17 Jólasøla í kjallaranum
**kl. 16.30 Kvøldseta - Úr føroyska skaldaheiminum:** Søgur, frásagnir, sangir og yrkingar. Lesibólkurin í Havnar Sjónleikarfelag

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundir verða leygardagin kl. 17–18.00, sunnudagin kl. 11–12.00 og mánadagin kl. 20–21.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
Skrivstovan Listafólkasamband Føroya í Pætursarstovu, er opin allar gerandisdagar frá kl. 9-12. Limir eru vælkomnir inn á gólvið.
tlf: 320197
teldupostur:lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:**
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
**Ungdómsumboð:** Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild, e-mail: torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897, e-mail: jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839. Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

**Av Dávidi**
**Harrin er mildur og náðigur, hevur umbæri og mikla miskunn.**
**Hann vil ikki altíð seta at okkum og ikki goyma vreiði sína um ævir.**
**Hann ferð ikki við okkum eftir syndum várum og lønir okkum ikki eftir misbrotum várum.**
**Nei, sum himin er háur yvir jørð, so er miskunn hans stór móti teim, sum hann óttast,**
**sum eystrið er fjarlagt frá vestri, so hevur hann firrað misgerðir várar frá okkum.**
**(Sálmur 103, vers 8-12)**

Sálmur 103 hjá Dávidi er ein fagnaðarsálmur burturav. **Sál mín, Harranum lova** er yvirskriftin og grundtónin í sálminum. Dávid lovprísar Gudi fyri, at hann ikki letur rættvísi manna ráða, men letur miskunn ganga fyri rætt. Hann viðurkennir at hann er syndari og at hann hevur brúk fyri Guds náði. - Ja meira enn tað, hann hevur sjálvur roynt Guds náði og hevur kennt tann frið og tað gleði, sum tað førir við sær.

Mangan verður tikið til, at Gamla Testamentið er so harðrent í mun til tað Nýggja. Orð úr Mósebókunum, so sum "Eyga fyri eyga og tonn fyri tonn", verða endurgivin sum dømi um hetta.

Rætt er, at mátini fyri revsing í Gamla Testamenti ljóða ógvuslig og stundum óskiljandi í oyrum okkara, men ævigi Gud er hin sami nú sum tá, og tað, sum var í móti vilja hansara tá, er eisini ímóti vilja hansara ídag.

Varð tað so nøkur náði í Gamla Testamenti? kunnu vit spyrja. Svarið er: Jú. Sálmur 103 hjá Dávidi sigur okkum í serligan mun um Guds náði, sum er omanfyri rættin eftir lógini. Dávid prísar Gudi fyri, at hann náðiliga hevur fyrigivið sær syndir sínar.

Fyrigevingin var tá eins og nú í hesum: at vit játta syndum okkara og biðja Jesus um náði.

Guds orð sigur okkum at: Um vit játta syndum okkara, tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hannn fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá alllari órættvísi.

Víðari lesa vit í Nýggja Testamenti at: *Øll hava syndað og vanta Guds heiður, og tey verða rættvísgjørd fyri onki av náði hansara við endurloysingini, sum er í Kristi Jesusi.*

Eisini vit, sum í dag játta syndum okkara og flýggja til náðar Guds í Kristi Jesusi, fáa at kenna tað somu gleði og tann sama friðin, sum Dávid lovprísar Gudi fyri í sálminum. Bíblian lærir okkum at: Friður Guds ber av øllum mannaviti. At kenna seg rættvísan og frígjørdan í Guds eygum, tað gevur frælsi, frímóð, gleði og mót til at liva lívið undir Guds náði.

Loysunnarorð:
**Sum eystrið er fjarlagt frá vestri, so hevur hann firrað misgerðir várar frá okkum.**

**Sverri Steinhólm**



## FØÐINGAR

8. november fingu Julianna Holm Jacobsen og Alvi Nielsen, Hoyvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 2950 gr.

9. november fingu Alete Hansen og Jack Jacobsen, Viborg, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3520 gr.

12. november fingu Julianna W. Høgnesen og Jóhan Sjóstein, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3850 gr.

15. november fingu Birgitte og Signar Hansen, Skjern, ein son, Kristian. Hann var 55 cm langur og vigaði 3860 gr.

15. november fingu Gunhild Nicolajsen og Atli Pedersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3600 gr.

17. november fingu Jette og Heri Kallsoy, Skála, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4235 gr.

17. november fingu Minny Elttør og Pauli Waag, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4200 gr.

17. november fingu Elisabeth Maria og Janus S. Rasmussen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3600 gr.

18. november fingu Ingrid og Birgir Petersen, Norðdepli, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3820 gr.

18. november fingu Birna Joensen, Klaksvík, og Ronny N. Olsen, Kambsdali, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 3700 gr.

19. november fingu Ann-Mari og Jákup av Skarði, Nólsoy, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3100 gr.

19. november fingu Urd Potts og Hans David á Brúnni, Skipanes, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3600 gr.

20. november fingu Eimée Jacobsen og Henry Fríði Mohr, Runavík, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 3800 gr.

21. november fingu Judith í Brekkunum og Gunnar Hansen, Hósvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4800 gr.

21. november fingu Andrea og Eydnar á Roykheyggi, Runavík, ein son. Hann var 59 cm langur og vigaði 4100 gr.

20. november fingu Sonja og Flemming Nielsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3400 gr.

18. november fingu Guðrun og Torkil Steinberg, Viðareiði, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4250 gr.

## ANDLÁT

**14. november**
Eyvind Akraberg Hansen, fyrrverandi telegrafstjóri, í Havn, 89 ár.
Henry Aksel Poulsen, føddur í Keypmannahavn, búsitandi í Havn, 62 ár.
Jenny A. Jacobsen, fødd Anthoniussen, Fuglafirði, ættað av Tvøroyri, 71 ár

**15. november**
Hans Jacob Johannesen, ætta?ur úr Miðvági, búsitandi í Havn, 79 ár.

**16. november**
Sivard Olsen, ættaður úr Køkinum á Toftum, búsitandi í Roskilde, 85 ár.

**17. november**
Einar Poulsen, Strendur, 78 ár
Annika Askham, Tórshavn, 83 ár

**18.november**
Jenny Hansen í Garðinum í Klaksvík, ættað av Tvøroyri, 75 ár.